Greenpeace vil steðga oljuvinnu á Atlantsmóti

Um nakrar fáar vikur byrjar fyrsta oljuframleiðslan á Atlantsmótinum skamt frá føroyska fiskimarkinum. Tað eru BP og Shell, sum standa fyri Foinaven-feltinum. Okkurt tykist tó benda á, at hetta fer ikki a vera uttan trupulleikar. Umhvørvisfelagsskapurin Greenpeace hevur eftir øllum at døma ætlanir um at seta kílar í ætlanina at framleiða olju í hesum nýggjasta oljuøkinum. Umboð fyri felagsskapin bera ótta fyri umhvørvinum. Tey halda, at oljufeløgini brúka økini til at gera royndir við nýggjari boriteknologi, nakað sum kann verða vandamikið fyri viðkvæma umhvørvið. BP vísir á, at tað ger alt fyri at verja umhvørvið.

JAN MÜLLER

Nú risastóru oljufeløgini BP og Shell eru við at gera klárt til fyrstu oljuframleiðsluna á Atlantsmótinum tvs. skamt frá føroyska markinum, ganga tíðindi um, at umhvørvisfelagsskapurin Greenpeace er við at fyrireika seg til at steðga ella forða oljufeløgunum í at fara undir framleiðslu á Foinaven feltinum.

Ætlanin var at framleiðslan á Foinaven skuldi byrja fyri góðum ári síðani. Av ymsum orsøkum er arbeiðið seinkað. Nú er so um at vera klárt til at taka fyrstu oljuna upp og føra hana til oljuterminalin á Flotta á Orknoyggjunum. Tað verður antin seinast í hesum mánaðinum ella í mai.



Greenpeace ger vart við seg

Í hesum døgum er so Greenpeace farið at gera vart við seg. Fólk frá felagsskapinum hava longu gjørt vart við seg á høvuðsstøðini hjá BP í Dyce uttan fyri Aberdeen.

Greenpeace heitir á BP um heldur at gera íløgur í sólorku enn í olju.

Umboð fyri BP siga við skotska blaðið Press & Journal, at veruliga ætlanin hjá Greenpeace er ikki at fokusera á sólorku men at seta kíkaran á oljukeldurnar hjá BP vestan fyri Hetland, nevniliga Foinaven og Schiehallion.

Greenpeace tykist hava sett sær fyri at forða BP í framleiðsluni ella í hvussu er at skapa oljufeløgunum trupulleikar, nú skrúvað verður frá fyrstu keldunum í hesum nýggja oljuøkinum.

Marcus Rand, umboð hjá Greenpeace sigur við Press & Journal, at varandi orkukeldur sum eitt nú sólorka er ein máti til tess at forða fyri broytingum í veðurlagnum.

-BP kann ikki ignorera hesa sannroynd bara tí at fyritøkan vinnur so nógvar pengar upp á olju. BP eigur at gera enn størri íløgur í sítt egna sólorkufelag og harvið gera sólorku til ein veruleika í Bretlandi sigur Marcus Rand við blaðið.

BP eigur annars eitt av heimsins størstu feløgum, sum framleiðir sólorkupanel. Fyritøkan hevur 500 fólk í arbeiði og hevði ein umsetning uppá 300 mill. kr. í 95.

Greenpeace sær fegið, at BP ger enn størri íløgur í sólorku. Felagsskapurin roknar við, at marknaðurin fyri sólorku í 2010 í Bretlandi verður verður meira enn 300 milliardir krónir. Eisini japanesar gera stórar íløgur í sólorku.

Sambært Press & Journal fer spurningurin um umhvørvi at vera rættiliga nógv í fokus, nú fyrsta oljan fer at verða framleitt á Atlantsmótinum.

Oljufeløgini vísa hinumegin á, at tey vísa stóran ans fyri umhørvinum. Hesum eru Greenpeacefólk ikki samd í, og tað tykist greitt, at eftir hendingina við Brent Spar í fjør, fyrireikar felagsskapurin seg aftur til at gera økið á Atlantsmótinum til ein nýggja stríðsvøll.

Greenpeacefólk siga við Press & Journal, at oljuútviklingurin á Atlantsmótinum byggir á óroynda teknologi, sum skal royndarkoyrast undir sera óíriðaligum veðurviðurskiftum.

-Hetta økið fer at verða brúkt til at royna nýggja boriteknologi - eitt øki við djúpum vatni og sera ringum veðri. Um hetta eydnast í hesum økinum, so fer tøknifrøðin at verða nýtt til at troyta onnur líknandi øki á høvunum sigur umboð fyri Greenpeace. Felagsskapurin ynskir, at „verðan" eftir olju og gassi verður steðgað í hesum sera viðkvæmu økjunum.

Felagsskapurin krevur, at framleiðsla og brenning av olju og gassi og koli sum heild verður heilt steðgað ella munandi skerd. Víst verður á, at vit eiga heldur at leggja økum eftir at troyta tær varandi oljukeldurnar so sum vatn, sól, vind og aðra orku.

Brent Spar bara byrjanin

Eins og Brent Spar varð mett sum eitt symbol uppá, hvat ikki eigur at verða gjørt, so ynskir felagsskapurin nú at gera alt Atlantsmótið til symbolið uppá, hvat ikki eigur at verða gjørt í framtíðini.

Press & Journal skrivar, at Greenpeace fer at gera alt tað er ment fyri at leggja forðingar í vegin fyri ætlaðu framleiðsluni á Foinaven oljufeltinum. Hvat felagsskapurin fer at gera er óvíst, men tað hevur verið gitt, at Greenpeace kann fara at royna at forða tangaskipunum í at koma til Flotta við farminum.

Síðani Greenpeace av álvara hevur gjørt vart við seg og víst á vandan við dálking av umhvørvinum á Atlantsmótanum hevur BP roynt at vísa á, hvussu nógv tað ger fyri at verja umhvørvið. Ein umboðsmaður fyri BP sigur við skotska blaðið, at fyritøkan arbeiðir við ætlanum um at minka um útsleppingina av olju og gassi í bæði luftina og á sjógv.

Í sambandi við fyrstu oljuframleiðsluna á Atlantsmótinum hevur BP gjørt eina rættiliga umfatandi kanning og ætlan fyri, hvussu dálking kann fyribyrgjast, og hvussu forðast kann fyri, at eitt óhapp kann gera skaða á umhvørvið.

Mentanarferð til Berlin

Í Kristihimmalferðarhalguni gera **Føroyingafelagið í Keypmannahavn og Sankta Olavs Kirkjulið eina mentunnarferð til Berlin.**

Farið verður við bussi úr Keypmannahavn **hósdagin 8. mai** á morgni og vit koma aftur **sunnukvøldið 11. mai.** Vit skulu búgva á einum góðum hotelli í syðra endanum av Berlin. bussin hava vit til nýtslu, meðan vit eru í býnum og vit hava ein frásøgumann við á ferðini, sum hevur lisið týskt í Berlin.

Skráin er fjølbroytt, millum annað kann nevnast, at vit sjálvandi siggja kendu støðini Brandenburger Tor, Potsdamer Platz, Alexander Platz, Check-point Charlie og sjálvandi spáka vit eftir Unter den Linden og Kurfurstendamm, men vit vitja eisini kirkjur, listaskála og savnið yvir brotsgerðirnar hjá nazistýrinum.

Á vegnum heimaftur siggja vit vakra økið uttan um Sanssouci slottið í Potsdam. Berlin er ein sera spennandi býur og í løtuni størsta byggiøki í Europa.

Ferðin kostar 1598 krónur.

Áhugaði kunnu venda sær til formannin í Føroyingafelagnum og nevndarlim í Sankta Olavs Kirkjuliði **Tóru Dahl Sandberg telefon 39297423** skjótast gjørligt, tí plássið er avmarkað í bussi og á gistingarhúsinum.

LEIÐARI

Søkt verður eftir leiðara til handilin í Havn

Leiðarin hevur ábyrgd av og tekur lut í øllum tí dagliga arbeiðnum í handlinum. Harafturat hevur leiðarin umsitingarligar uppgávur so sum eftirlit við og avstemman av sølu og kassauppgerðum, rapporteringar av ymiskum slag, eftirlit við starvsskipanunum fyri handilin, ad hoc uppgávur í samband við hagtøl v.m., umframt hylladisponering og at leggja tilrættis framsýning í handlinum.
Starvsfólkauppgávur fevna m.a. um tilrættislegging av arbeiðnum, arbeiðsætlanir og ferieætlanir, og upplæring av nýggjum starvsfólkum.

Handilsútbúgving og kunnleiki til bókhaldsskipanina Navigator, rokniark og tekstviðgerð kunnu verða fyrimunir. Men Rúsdrekkasølan kann eisini veita neyðugu upplæringina, um rætti persónurin ikki hevur hesar førleikar.

Dentur verður lagdur á at leiðarin er arbeiðssamur, áræðin og hevur góð samstarvsevnir.

Leiðarin skal byrja í seinasta lagi 1. juni 1997, og starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum skal vera Rúsdrekkasøluni í hendi í seinasta lagi 24. apríl.

Rúsdrekkasøla Landsins
Postboks 3069 • Hoyvíksvegur 51
Tlf. 14277 • Fax 12260